

# Vinnuleiðari

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara til nýstovnaða Vinnudeild.

### Vinnudeildin

Deildin er eitt úrslit av tí arbeiði, sum hevur verið gjørt seinastu tvey árini við at bøta um karmarnar hjá vinnuni í Tórshavnar kommunu.

Deildin verður mannað við einum deildarleiðara og einum samskipara. Leiðarin fær ábyrgd av at byggja upp frá grundini eina vælvirkandi deild. Deildin vísir til kommunustjóran.

Starvið byggir á samstarv við vinnuna og stovnar, ið varða av vinnuni, eins og nógv av arbeiðinum hjá deildini er nær tengt at øðrum deildum hjá kommununi.

### Arbeiðsuppgávur

Uppgávurnar á deildini verða millum annað:

- Vinnumenning- og strategi
- Almenn viðurskifti sum viðvíkja vinnuni
- Skapa burðardyggar lokalar karmar fyri vinnuni
- Lýsa, kunna og ráðgeva um møguleikar og tænastur, sum Tórshavnar kommuna bjóðar vinnuni
- Vinnuráðgeving, serliga til íverksetarar

Tórshavnar kommuna bjóðar eitt spennandi og dynamiskt arbeiðspláss við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum. Góðir møguleikar eru fyri fakligari og persónligari menning.

### Førleikakrøv

Vit sóknast eftir einum deildarleiðara við hægri útbúgving á kandidatstøði við viðkomandi royndum frá bæði almenna og privata arbeiðsmarknaðinum eins og royndir sum verkætlanarleiðari eru ein fyrimunur.

Góð samskiftisevni og góðir samstarvseginleikar eru ein fortreyt, eins og opinleiki fyri avbjóðingum og nýggjum møguleikum eisini er tað.

Vit hugsa okkum, at tú dugir væl at samskifta bæði munnliga og skrivliga á føroyskum og á enskum, er framsíggin, framsøkin og hevur úrslit at vísa á.

### Setanarviðurskifti

Starvið verður sett skjótast til ber og lønt sambært avvarðandi sáttmála.

### Umsókn

saman við prógvum, viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 6. november 2007 kl. 16.00. Merkið umsóknina „Deildarleiðari til Vinnudeildina".

### Meira fæst at vita

um starvið við at venda tær til Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, ella Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, á tlf. 30 20 10.

**Tórshavnar kommuna**

---

Hátíðarhald

# Hovstunnilin letur upp



## Leygardagin 20. oktober kl. 14.00 letur Hovstunnilin upp alment.

Tað verður 85 ára gamli Poul Midjord í Hovi, sum saman við Jóannesi Eidesgaard, løgmanni, verður fyrstur at koyra gjøgnum tunnilin. Poul Midjord var eisini tann fyrsti at koyra eftir nýggja vegnum millum Tvøroyri og Hov, tá ið vegurin var tikin í nýtslu fyri 50 árum síðan.

Aftaná verður alment hátíðarhald í Gistingarhúsinum í Øravík, har øll eru vælkomin.

## Skráin fyri dagin

**Við tunnilsmunnan hovsmegin:**

**Kl. 14.00** Tvøroyrar hornorkestur spælir.
Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, bjóðar vælkomin.
Jóannes Eidesgaard, Løgmaður, flytir fram røðu.
Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur nøkur orð.
Snórurin verður skorin.

Síðan fer bilafylgið gjøgnum tunnilin. Aftaná koma motorsúkklur, súkklur, rennarar og fólk til gongu.

**Kl. 15-17** Alment hátíðarhald í Gistingarhúsinum í Øravík við røðum, har landsstýrismaðurin í vinnumálum leggur fyri. Landsverk bjóðar øllum kaffi og kransakøku.
**Kl. 17-19** Tvøroyrar kommuna og Handilsfelagið á Tvøroyri bjóða tunnilskøku, kaffi, bollar og ballónir í miðbýnum á Tvøroyri. Regluligt busssamband verður millum Øravík og Tvøroyri.
**Kl. 19.00** Livandi tónleikur í miðbýnum á Tvøroyri.
**Kl. 19.00** Veitsla fyri innbodnum í ítróttarhøllini í Trongisvági, har Landsverk er vertur.
**Kl. 23.00** Tunnilsdansur í ítróttarhøllini.

** St. Ola siglir kl. 10.00 av Havnini leygarmorgun.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

REPROZ